Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Samansetingin av limum í Sjúklingaráðnum

Spurningar:

1. Eftir hvørjum leiðreglum hevur landsstýrismaðurin valt limir í nývalda Sjúklingaráðið?
2. Hvørjar grundgevingar hevur landsstýrismaðurin fyri at velja júst hesar fimm limirnar í Sjúklingaráðið?
3. Hvørji landafrøðilig øki eru umboðað í Sjúklingaráðnum, og hví er hendan landafrøðiliga samansetingin vald?

Viðmerkingar:
Í farna mánað valdi landsstýrismaðurin Sjúklingaráðið av nýggjum. Kunngerðin sigur greitt, at landsstýrismaðurin skal velja limir eftir uppskoti frá sjúklingafeløgum, sum umboða sjúklingar, ið vanliga verða viðgjørdir á sjúkrahúsunum.

Tey valdu eru avgjørt skikkað sum limir í Sjúklingaráðnum. Men tað eru eisini onnur sjúklingafeløg við limum, sum ikki eru umboðað í ráðnum. Hesi feløgini umboða fólk við somatiskum sjúkum, sum í stóran mun verða viðgjørd á sjúkrahúsunum, eitt nú hjartasjúkur og diabetessjúkur.

Haraftrat sær út til, at summi landafrøðilig øki, eitt nú Norðoyggjar, ikki eru umboðað í ráðnum. Landsstýrismaðurin verður tí biðin um at greiða frá, hví so er.

Á Løgtingi, 07. november 2022

Eyðgunn Samuelsen